**Samvinnan:**

# VAKNA

# – annars koma vit ikki heim!

TAÐ ER AV **ALSTÓRUM** TÝDNINGI, AT VINNAN Í FØROYUM VAKNAR OG FÆR EYGUNI UPP FYRI TÍ ÓMETALIGA VIRÐINUM Í TEIMUM LESANDI **UTTANLANDS**. ANNARS FÆR TAÐ ÁLVARSAMAR **AVLEIÐINGAR** FYRI TEY LESANDI, VINNUNA OG ALT FØROYA LAND. HETTA SIGUR TRÓNDUR HENTZE SØRENSEN, SUM ER **STIGTAKARI** OG FORMAÐUR Í FELAGSSKAPINUM **'SAMVINNAN'**, SUM ER EIN NÝGGJUR FELAGSSKAPUR FYRI LESANDI Á CBS, TAÐ SUM FYRR VARÐ KALLAÐ **HANDILSHÁSKÚLIN** Í KEYPMANNAHAVN



**LESANDI**
Óli Jákup Jacobsen

"Tað byrjaði við, at eg og Ólavur Ólavsson, sum eisini lesur á CBS, eitt kvøldi fyri trimum árum síðan sótu og tosaðu um, hvussu nógvir føroyingar tað mundu ganga her á skúlanum. Sum vit sótu og prátaðu, komu vit inná, at hóast tað ivaleyst vóru eini 200 ella fleiri, so visti eingin stórt sæð av hvørjum øðrum vegna manglandi samskifti. Tað var øgiligt spell, tí sum føroyingar við felags áhugamálum í Keypmannahavn, kundi tað bara vera ein fyrimunur fyri okkum, at vit kundu standa saman einum felagsskapi. Tá fingu vit so hugskotið at stovna ein felagsskap, sum fekk navnið 'Samvinnan'", sigur Tróndur.

## 'Bert' ein sosialur felagsskapur

Eftir stovnandi aðalfundin í 2007 varð Ólavur valdur til nevndarformann, meðan Tróndur varð valdur til næstformann. Í 2009 gjørdist Tróndur formaður. Ólavur er tó enn í nevndini sum vanligur nevndarlimur.

"Í byrjanini var Samvinnan einans ætlað teimum lesandi á CBS, so tey kundu læra hvønn annan at kenna. Vit byrjaðu í tí smáa, har vit upplýstu um felagsskapin við at fáa hann út í orð, og so við og við byrjaði Samvinnan at koma runt til føroyingarnar á CBS. Eisini hava vit roynt at brúkt Facebook nógv í okkara marknaðarføring av felagnum, tí hetta er bæði lætt, bíligt og effektivt. Eftir eina tíð føldu vit, at tað var neyðugt at skipa fyri onkrum tiltøkum fyri at staðfesta felagsskapin," sigur Eva Nolsøe, sum gjørdist nevndarlimur á síðsta nevndarfundi.

"Tiltøkini hava í høvuðsheitum verið hálvárligar veitslur við góðum mati og hugna. Tann sosiala felagsskapin meta vit at hava ómetaliga stóran týdning. Um eini 25 hava verið hvørja ferð, men ynskja og vænta vit, at hetta talið verður hægri í framtíðini. Eitt annað tiltak, sum vit hava regluliga, er hósdagscafé. Tá møtast vit í caféini, sum er á CBS fyri at tosa og hugna okkum," sigur Emil, ið eisini varð valdur á fyrsta sinni í nevndina síðsta aðalfund.

*Búmerkið hjá Samvinnuni*

## Føroyska vinnan er blind

Eitt av endamálunum hjá Samvinnuni er at lata eyguni á tí føroysku vinnuni upp.

"Tað er ógvuliga hugstoytt at síggja, hvussu líkasæl føroyska vinnan er fyri lestrarumhvørvinum hjá føroyingum. Sjálvsagt eru møguleikarnir nógv størri her í Danmark, tá Danmark er meira enn hundrað ferðir so stórt sum Føroyar. Men fyri tað kann føroyska vinnan gera nakað meir, enn hon ger í dag," sigur Eva.

"Bara tað at skriva eina kandidatritgerð um eina føroyska fyritøku tykist at vera næstan ógjørligt. Sjálvsagt skulu øll ikki skerast yvir ein kamb, men vanligi hugburðurin hjá føroyskum fyritøkum er "Hvat vilja tit nú?", tá lesandi seta seg í samband við seg. Tað sigur seg sjálvt, at um ein møtir slíkum hugburði frá teimum føroysku fyritøkunu, hvørvur allur áhugi fyri at skriva um. Harvið fer eisini ein rúgva av potentiellari vitan til spillis," sigur Emil.

"Eitt dømi um, hvussu lítil áhugi er í Føroyum, er, at ein vinmaður hjá mær skuldi skriva sína kandidatritgerð. Hann vildi ógvuliga fegin skriva um eina føroyska fyritøku, og setti hann seg tí í samband við eina rættiliga stóra fyritøku heima í Føroyum. Heilar tríggjar ferðir skrivaði hann til hesa fyritøkuna, um tey møguliga vóru áhugað í at skrivað varð um hana. Í sínum skrivi bjóðaði hann sær at gera eina fulla greining av fyritøkuni. Hon vildi innihildið henta og eventuelt týdningarmikla ráðgeving og upplýsingar um fyritøkuna, sum hon hevði fingið fulkomiliga ókeypis. Ein greining, sum fyritøkur í Danmark vildu goldið í dýrum dómum fyri. Tað einasta, sum kravdist av fyritøkuni, var, at hon setti tveir ella tríggjar tímar av til viðkomandi og góvu honum nøkur tøl. Hann fekk ikki so mikið sum eitt svar," sigur Tróndur og ristir við høvdinum, meðan hann heldur fram "Tað ringasta, sum kundi hent fyri hesa fyritøkuna, var, at tey høvdu fingið eitt nýtt sýni á fyritøkuna. Har var einki at tapa og alt at vinna."

"Í stuttum kann sigast, at tær føroysku fyritøkurnar við slíkum hugburði skjóta seg sjálvar væl og virðiliga í fótin," sigur Emil.

## Føroyar tapa

Tað eru ikki einans tey lesandi og vinnan, sum verða við sviðið soð við núverandi hugburði. "Føroyaland kann í síðsta enda standa eftir sum tann stóri taparin. Um tær føroysku fyritøkurnar ikki vakna og síggja virðið í teimum lesandi, er tað eisini sannlíkt, at tey lesandi í útlandinum ongantíð fara at arbeiða fyri tær. Um tær donsku og